# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Skáka sær undan í Taksmálinum

Tað eigur at vera sligið fast, at bila mvg málið er eitt politiskt mál, og ikki eitt umsitingarligt mál. Málið helt uppat at vera umsitingarligt tann dagin, almennu Føroyar valdu at fara í rættin við einari avgerð frá Skatta- og avgjaldskærunevndini.

Tað er líkt til, fíggjarmálaráðharrin vil spæla svartaper víðari til eftirmann sín, sum so kann standa við apuni, tá málið einaferð er liðugt. Tá kann TAKS so yppa øksl og siga við Palliba og Marsannu, at tey hava goldið av óróttum, men at málini tíverri øll eru fyrnaði, tí at TAKS, ístaðin fyri at fylgja Skatta- og avgjaldskærunevndini, fór í rættin við málinum.

Størri háðan av skattgjaldarnum fyri egnar pengar man vera eindømi. TAKS veit frá Skatta- og avgjaldskærunevndini, at heimildin ikki er í lagi, og tí eigur TAKS at gjalda út treytaleyst. Eitt demokratiskt samfelag kann ikki hava pening, sum avvarandi myndugleiki veit er tikin inn í heimildarloysi!

Tá Fíggjarmálaráðharrin púra burturvið tosar um demokratisku rættindini hjá TAKS, sum um talan var um ein borgara, so vísir hann, at hann ikki hevur skilt leiklut sín sum politikari, og ei heldur leiklutin hjá umsitingini. TAKS er ein stovnur, sum er til fyri at tryggja demokratisku rættindini og rættartrygdina hjá borgarunum og einki annað. Er ósamsvar millum rættindini hjá borgaranum, og hvat ein stovnur ger, so er eingin ivi um, hvat ein politikari eigur at gera.

Politikarar eiga at seta krøv til umsitingina, og at seta hana uppá pláss, tá hon fer útum sínar heimildir. Óansæð um talan er um eitt mál fyri hundrað milliónir ella tíggju krónur.

At TAKS hevur á leið dupult so nógv starvsfólk per íbúgva, sum danska skattavaldið, kundi bent á, at politiska leiðslan í áravís hevur latið stovnin og Fíggjarmálaráðið siglt sín egna sjógv.

Sleppur TAKS sjálvt at avgera, hvørt Skatta- og avgjaldskærunevndin skal fylgjast ella ikki? Um so er, so eigur landstýrismaðurin at avtaka Skatta- og avgjaldskærunevndina beinanvegin. Skattgjaldarin hevur ikki ráð til at hava almennar kærunevndir til pynt!

Hvør koyrdi hetta mál í rættin? Hvør tók nú avgerð um at kæra? Sosialurin hevur biðið um alment innlit í hetta málið fyri at greina, hvør gjørdi hvat nær, og vit bíða spent eftir svarinum.

Mong munnu nú spyrja: hvat hendir nú og hvørjar avleiðingar fær hetta mál? Sjálvstýrisflokkurin hevur meldað út, men hvat sigur flokkur fíggjarmálaráðharrans, sum skal eitast at verja vanliga borgaran? Eru politikarar í stóru flokkunum, sum jú flestallir hava okkurt í klemmu her, so ræddir fyri rokningini, at vanlig demokratisk prinsipp verða tveitt fyri borð?

**Sosialurin**

## Floksdisciplin

EILIF SAMUELSEN



Eitt av teimum grundleggjandi meginsjónarmiðunum í parlamentarisku skipanini er, at teir valdu tinglimirnir taka seg saman í flokkar. Í Danmarks Riges Grundlov stendur einki um politiskar flokkar, tí tað eru teir einstøku valdu persónarnir, sum hava mandatini, tvs, sum hava fingið heimildina frá sínum veljarum at umboða teir á tingi. Men tinglimirnir eru kortini suverenir, tað vil siga, at teir einans eru bundnir av síni sannføring og ikki av nakrari forskrift frá sínum veljarum (§56). At grundlógin framvegis hevur tað sjónarmiðið, at tað eru einstaklingar, sum hava fingið álitið frá veljarunum, gongur eisini fram av §41, stk. 1, sum gevur einum og hvørjum limi í tinginum rætt til at leggja fram lógaruppskot og uppskot til samtyktar.

Kortini hevur gongdin verið tann, at hóast tinglimirnir í fyrstani í prinsippinum vóru leysir av flokkum, so eru teir í dag allir stillaðir upp á listar og eru valdir gjøgnum politiskar flokkar. Allir tinglimir síggja seg sjálvar og hinar tinglimirnar fyrst og fremst sum umboð fyri ein politiskan flokk, sum hevur eina politiska stevnuskrá. Tað kann ofta koma einum nývaldum óvart á, hvat tað í grundini ber í sær at verða valdur á ting fyri ein politiskan flokk og gerast limur í einum tingbólki. Tá verður ein við hvørt noyddur at boyggja seg at tí felags viljanum. Á tingi snýr tað seg nógv um at gera meirilutar, og harvið kemur ein út í politiskt stríð við umboð fyri aðrar flokkar. Men vanliga er samarbeiðið millum starvsfelagar rættiliga gott. Ein skilir og virðir í høvuðsheitum politisku sjónarmiðini hjá hinum, og vanliga verða óskrivaðar spælireglur virdar, t.d. at gjørdar avtalur verða hildnar.

Eitt eru tær politisku ósemjurnar við limir úr øðrum politiskum flokkum, men ofta eru teir størstu trupulleikarnir innanfloks, í egnu tingmanningini. Teir einstøku tinglimirnir skulu í samarbeiði við hini av manningini og ofta í kapping royna at gera vart við seg og koma sær fram, og tá kunnu neistar fúka.

Tað vanliga er, at tá ið ein tinglimur er valdur á ting, so er hann tað eina og aleina tí, at flokkurin hevur stillað hann upp á sín lista. Tí verður væntað av honum ella henni, at tey eru loyal móti tingbólkinum og vísa tað, ið kallað verður floksdisciplin. Tað sigur seg sjálvt, at fyri floksins arbeiði í tinginum hevur tað stóran týdning og eisini fyri trúvirðið úteftir, at tingmanningin stendur samd. Floksformaðurin má, serliga tá flokkurin er í samgongu, hava eina rímiliga vissu fyri, at hann hevur allan flokkin við sær, tá ið atkvøðast skal. Um ein tinglimur ikki heldur seg kunna tað, má hann í góðari tíð týðiliga siga frá tí á einum innanhýsis floksfundi og annars ikki gera málið til eitt evni fyri fjølmiðlarnar.

### Samhald

Sambandsflokkurin hevur gjøgnum tíðirnar sett eina æru í, at flokkurin úteftir stendur samdur. Tað merkir ikki, at teir einstøku tinglimirnir altíð eru samdir um øll mál, men vanligt hevur verið, at ymisk sjónarmið og ymiskar áskoðanir til ávís mál hava verið umrødd út í æsir innanhýsis, inntil málið er avklárað soleiðis, at flokkurin er komin til eina felags støðu, t.v.s. at einstakir tinglimir í tingsalinum vanliga atkvøða saman við tingmanning floksins. Tað er helst eisini so, at tann eyðmjúka floksættarkenslan mundi vera sterkari fyrr, enn hon hevur verið nú í nýggjari tíð. Tí síggjast kanska fleiri ganga solo. Fyrr hugsaðu einstøk tingfólk í álvarsligum tvístøðum fyrst og fremst um flokkin, og lótu sær tí lynda at fylgja meirlutanum og tessvegna styrktu flokkin og soleiðis eftirsíðan heystaðu fruktirnar av einum prinsippføstum flokki.

Í dagsins politikki hava vit, sum standa uttanfyri, varhugan av, at teir tríggir leiðararnir fyri samgonguflokkarnar hava staðið yvir fyri einum sera ósamanhangandi hópi av samgongutingfólkum, harav nógv, sum eina meira og minni dulda dagsskrá, hava havt ynski um at røkja og verja ymisk seráhugamál. Hetta hevur óivað verið ein orsøkin til, at so lítið av yvirskipaðum tiltøkum eru komin ígjøgnum. Samgongan hevur jú ein rúman meirluta aftan fyri seg. Hví duga teir tríggir samgonguleiðararnir ikki at fáa tropparnar at ganga í takt? Teir hava jú buktina og báðar endarnar í tinginum. Kunsturin er jú til eina og hvørja tíð, at hvør flokkur sær, við góðum ella við illum, fær sínar limir at taka undir við tí málinum, sum floksleiðararnir eru samdir um at fremja.

Eg skal ikki á nakran hátt bera í bøtuflaka fyri umstrídda atburðin hjá hvørki Magna Laksafoss ella Edmundi Joensen, men eg skilji væl teirra frustratiónir av, at so ørsýna lítið av framfýsnum úrslitum kemur á skaftið hjá hesi samgonguni, men eg hevði ynskt, at teir báðir við sínum eyðsýndu dygdum vóru inni á stríðsvøllinum og kempaðu fyri at røkka úrslitum. At standa uttan fyri politiska vígvøllin er tað reina teatur.

Tað er bæði syndarligt og mannminkandi fyri landsstýrið, at Rósa Samuelsen skal verða sett fram á uriaspostin at prógva, at samgongan meinar nakað við sínum sparipolitikki. Alt, sum hevur við almannamál at gera, er jú so sera kenslusamt, harfyri skal tað økið ikki vera friðað; men fyri at hava javnvág í, so bíða vit eftir einum inntrivi, sum eisini knokkroytir tey úti í øllum samfelagnum, sum liva í yvirflóð. Verður tað gjørt í sama lutfalli, so verða spardar meira enn tær fýra milliónirnar, sum pensiónistarnir verða noyddir at rinda aftrat.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13:30

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.